FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA



Starvslýsing:

# WEB-HØGGUSLOKKUR

**KT-tænastan á Fróðskaparsetri Føroya leitar eftir fyrstafloks web-høgguslokki**

Við hesum verður lýst eftir fólki til KT-tænastuna hjá Fróðskaparsetri Føroya at byrja skjótast gjørligt. Setrið er í vøkstri, KT-kervið og krøvini til hetta er í støðugum vøkstri og uppgávurnar gerast alsamt fleiri og meiri fjølbroyttar. Tískil hava vit nú brúk fyri einum fjøltáttaðum KT-fólki við denti á kunnleika til nútímans webtøkni.

Starvið fevnir fyrst og fremst um menning og dagligt viðlíkahald av heimasíðuni www.setur.fo. Umsitarin skal røkja síðuna í neyvum samstarvi við úrvald starvsfólk á ymsu deildum Setursins. Fyrimun hava umsøkjarir við góðum førleika í grafikk-framleiðslu og myndaviðgerð og við royndum við CMS-skipanum.

Eisini hevur KT-Tænastan ymiskar menningar-verkætlanir í umbúna og fólkið, ið verður sett í starv, skal eftir førimuni eisini taka lut í hesum arbeiði. Grundleggjandi kunnleiki til arbeiði við nøkrum av fylgjandi: ASP, .NET, PHP, Perl, SQL, XML, XHTML, AJAX verður væntað av umsøkjara.

Harumframt kann roknast við onkrum uppgávum í samband við tann dagliga raksturin av Traðarnetinum.

Hevur tú onkran spurning um starvið, er tú vælkomin at senda teldupost til Óla Simonsen KT-leiðara, á olis@setur.fo. Eisini ber til at ringja til Óla í vanligari arbeiðstíð á 352570.

Umsókn við CV og prógvi um viðkomandi útbúgving og/ella royndir skal sendast til:

Fróðskaparsetur Føroya
ATT: KT-starv
J.C. Svabosgøta 14
FO-100 Tórshavn

Freistin at søkja er mánadagin 13. oktober 2008.

Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

KT-tænastan er deild hjá Fróðskaparsetrinum beinleiðis undir setursfyrisitingini, sum er dagliga leiðsla stovnsins. Tænastan hevur dagliga raksturin av Traðarnetinum um hendi; Traðarnetið er dátunetið hjá undirvísingar- og granskingarstovnunum á Debesartrøð, og veitir stovnunum ymsar tænastur, so sum Internet-atgongd, firewall, virusverju, teldupost-ambætara, filugoymslu, webhotell, backup, undirvísing, ráðveging o.a. Undirstøðukervið á okkara neti byggir m.a. á Cisco, Novell, VMware, Linux og Windows.

ókeypis.fo
...fá meira fyri einki!
Fær inn á ókeypis.fo og svara nøkrum spurningum og verð við í lutakastinum um góðu vinningarnar!

Vit betra deildina í Miðvági
FØROYABANKI
Vegna umvælingar verður deildin í Miðvági stongd frá mánadegnum 22. september. Latið verður upp aftur mikudagin 1. oktober. Viðskiftafólk verða biðin um at nýta deildina í Sørvági hesar dagar.
www.foroya.fo
SENDISTOVAN



# Útbjóðing

Arbeiðið at byggja nýggjan Bónus-handil við Borðoyarvík í Klaksvík verður hervið boðið út í almenna lisitatión.

Arbeiðið skal gerast sum høvuðsentreprisa, tó undantikið el-arbeiði og múraraarbeiði. Arbeiðsánarin tilskilar sær rættin at velja ímillum innkomnu tilboðini ella at havna tey øll.

Freistin at biðja um útbjóðingartilfar er mikudagin 24. september 2008 kl. 12.00.

Tilfarið fæst frá undirritaða móti veðhaldi á kr. 10.000,00 á krossaðum kekki. Veðhaldið verður leysgivið um tilfarið er undirritaða í hendi í óskalaðum líki í seinasta lagi 14 dagar aftaná lisitatiónina.

Ástaðarfundur verður á byggiøkinum í Klaksvík mikudagin 1. oktober kl. 11.00.

Lisitatiónin verður 15. oktober kl. 11.00 á SMS-skrivstovuni. Tey bjóðandi kunnu vera hjástødd.

Vegna P/f SMS

**Teknistovan Magnus** Sp/f
Gríms Kambansgøta 17
FO 100 Tórshavn
Tel. 317706, fartel. 217705, E-mail: magnus@magnus.fo

TEKNISTOVAN MAGNUS spf